# Heilsanir



Øllum tykkum, sum á ymiskan hátt vóru við til at gera okkara brúdleypsdag so ómetaliga ríkan og minniligan, takka við hjartaliga.
**Bestu heilsanir Maria og Reindolf Deku**



**Góða fitta Borghild**
Hjartaliga tillukku við 4 ára degnum týsdagin. Gleða okkum at koma í føðingardag.
**Muss og klemm frá ommu og abba í Havn**



Vit vilja fegin takka tykkum, ið vóru við til at gera okkara hjúnabandsdag tann 9. mai 2009 ógloymandi og minnisríkan. Eisini takka vit hjartaliga fyri góða hjálp í sambandi við brúðardagin og brúðarhús.
**Brynja & Fróði Dam**



**Lovely Lula**
Tillukku við degnum í dag kera - 16 ár. Vónandi fekst tú ein framúrskarandi dag. Alt tað besta
**Liindus**



**Góða kona og omma**
Hjartaliga til lukku við 70-ára føðingardegnum.
Takk fyri, at tú so góð við okkum øll.
**Ynskja vit trý**



Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum á ymiskan hátt vóru við til at gera brúdleypsdag okkara 1. august 2009 so serligan, hugnaligan og minnisríkan. Takk til familju, vinir og kenningar fyri alla hjálp, sangir, talur, blómur, gávur o.a. Takk til øll tykkum, sum vóru við til at gleðast saman við okkum á hesum stóra degi, má Harrin ríkiliga signa tykkum øll.
**Martin og Hanna**



**Góða fitta Bára**
Hjartaliga tillukku við 10 ára føðingardegnum. Vit ynskja tær alt tað besta í framtíðini.
**Muss og klemm frá ommu og abba**



**Góða fitta elskuliga Jóhanna**
Hjartaliga tillukku við degnum. Ein heilsan til stórasystur. Jesus pápi signa tykkum.
**Heilsan langomma, langabbi í Klaksvík**



Eg og foreldur míni takka hjartaliga øllum, sum á ymiskan hátt gleddu meg á fermingardegi mínum 28. mars 2010.
**Kærastu heilsanir Búi Egilsson, Vágur**



**Góði Rasmus abbi**
Hjartaliga tillukku við 60 ára degnum í dag 11. juni. Vit gleða okkum at fara túr aftur skjótt. Alt tað besta ynskja vit tær.
**Heilsan Rasmus, Finnur, Jona, Brynhild, Eydna, Maria, Sofía og Dánjal**

# Merkisdagar

## 60 ára føðingardagur
Týsdagin 22. juni kann Poul Jóhan Djurhuus, Glyvrar, halda 60 ára føðingardag. Dagurin verður hildin í Kelduni í Skálabotni týskvøldið kl. 18. Byrjað verður við sangløtu, og aftaná verður borðreitt við føroyskum viðskera. Byrjað verður stundisliga. Øll eru hjartaliga vælkomin.

## 60 ára føðingardagur
Mikudagin 4. august verður Heiðveig Tindskarð, Tórshavn, 60 ár. Føðingardagurin verður hildin í Róðrarneystinum á Argjum leygardagin 17. juli kl. 18. Tey ið vilja gleða Heiðveig við at koma í føðingardag, verða vinarliga biðin um, at siga frá innan 20. juni á tlf.: 317326/264030 (Heiðveig), 277556 (Barbara), 227796 (Yvonna).

## 80 ára føðingardagur
1. juli fyllur Kaspara Hjelm úr vági 80 ár. Føðingardagin ætlar hon at halda í Vági leygardagin 17. juli. Tey ið vilja gleða Kasparu við at koma í føðingardag verða vinaliga biðin um at siga frá innan 21. juni hjá Inu 371551 ella Torgerð 573999.

## 80 ára føðingardagur
Leygardagin 26. juni verður Hjørdis Joensen, Vágur, 80 ár. Tey ið ynskja at heilsa uppá Hjørdis eru hjartaliga vælkomin á Bakkan 3. juli millum kl. 11 og 17.

## Silvurbrúdleyp
Tann 1. juni hava Elsba og Eivind Danielsen verið gift í 25 ár. Dagurin verður hildin 3. juli í B36 húsinum kl. 19. Tey sum vilja hátíðarhalda dagin saman við okkum, verða vinarligast biðin um at siga frá á tlf. 321932 ella 224802 í seinasta lagi 20. juni.

## Silvurbrúdleyp
Týsdagin 15. juni hava Nomi Høghamar og Edvard Pauli Ejdesgaard, Eiði, silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin leygardagin 19. juni kl. 19 á Gerðisvegi 7. Tey, ið ynskja at gleðast saman við okkum eru hjartaliga vælkomin.

## Silvurbrúdleyp
Týsdagin 22. juni hava Bodil og Eliesar Finnsson, Hólavegur 23, Porkeri, silvurbrúdleyp. Veitsan verður fríggjakvøldið 25. juni kl. 19 á Hotel Øravík, tey ið vilja gleða okkum at koma, verða biðin at siga frá á tlf. 373860 ella 227496.

## Silvurbrúdleyp
Týsdagin 20. juli hava Tórun og Øssur Magnussen verið gift í 25 ár. Vælkomst verður í Solaris í Húsavík 17. juli kl. 19. Tey sum vilja verða við til at gleða okkum mugu siga frá innan 4. juli til Tórun á tlf. 361780 ella Nenu á tlf. 319318 ella nena@olivant.fo

## Gullbrúdleyp
Mánadagin 12. juli hava Poula og Kári Hammer, Vágur, gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin í samkomuhúsinum Bethel sama dag kl. 18. Tey, ið ynskja at gleða brúðarparið við at koma til veitsluna, verða vinarliga biðin um at siga frá innan 28. juni á tlf. 225896 (Kári), 261620 (Majken) ella til gullbrudleyp@gmail.com.